# Menninir handan lýsingina

**Handan eina lýsing, fjalir ein søga seg. Tað er bert sjáldan, at vit geva okum far um hetta. Hvør hugsar t.d. um lagnurnar aftanfyri, tá djór verða latin vegna flytting ella brúðarklæði verða seld óbrúkt. Sosialurin seti sær fyri at hyggja nærri handan eina lýsing, har ungir havnardreingir søkja guitarleikara**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Í góðveðrinum hósdagin leitaði blaðmaðurin niðan í Svanga í Havn. Avtalað var gjørd við tveir ungar tónleikarar, ið vóru menninir handan eina lýsing í Sosialinum, har teir sóknaðust eftir guitarleikara.

Avgjørt var at svara uppá lýsingina, ikki fyri at bjóða guitarkunnleika fram, men fyri at kaða afturum lýsingina og kanna, hvat ungir tónleikarar í dag takast við, hvat teir droyma um og hvørjar ætlanirnar eru.

Eitt bilhús við talinum 35, sigur blaðmanninum, at her er tað, at tónleikararnir halda til. Og ímyndin av einum garagubólki troðkar seg fram, men garagan er stongd. Á einum loftskamarið í einum húsum í Svanga í Havn hittu vit teir báðar Sigurd Justinussen og Jan Jensen. Sigurd leikar trummur og Jan leikar bass.

### Vilja nú víðari

Teir báðir tónleikararnir eru 15 ára gamlir og vilja fegnir finna ein guitarleikara.

- Vit hava ikki spælt so leingi, men hava tó roynt hetta við at vera í bólki. Eittnú vóru vit báðir og ein limur í bólkium Sideeffect í bólki saman, greiða Sigurd og Jan frá, meðan ein vinmaður teirra, ið eisini er inni, høviskur spyr, um hann skal dempa. Hann situr og spælir við PlayStation.

Maðurin úr Sideeffect hevði tó ov nógv um oyruni og tók seg aftur. Nú vilja Sigurd og Jan víðari og sóknast tí eftir guitarleikara.

Teir báðir ganga í Musikkskúlanum í Djónastovu. Hetta ger, at teir eisini hava rætt at venja har. Einasta krav er, at teir spæla til PopTop konsert og hesar treytir eru teir væl nøgdir við. Til seinastu PopTop konsert leiktu Sigurd og Jan við bólkinum Cement.



Sigurd og Jan eru menninir handan lýsingina, har sóknast verður eftir guitarleikara.
(Mynd: Dagfinn Olsen)

### Spæla rock á enskum

Spurdir, hvat slag av tónleiki teir leika, siga teir, at talan er um rock.

- Vit eru ungir, so tað undrar kanska ikki, at vit spæla rock. Men tó kann fingraspæl og okkurt akkustiskt eisini koma ímillum. Men talan er ikki um nakað dreingjaorkestur sum soleiðis. Heldur ikki um blues ella main stream, staðfesta báðir.

Sigurd skrivar orð og løg og Jan hevur eisini roynt seg.

- Vit hava roynt at skriva løg. Tekstirnir eru á enskum, sigur Sigurd, men hann veit ikki júst hví. Tað er bara so, at honum dámar betri tað enska, enn føroyska.

- Tað er stuttligt at spæla okkurt, ið ein sjálvur hevur gjørt. Tað er ein av orsøkunum til, at vit vilja gera ein bólk, siga Sigurd og Jan.

- Eg byrjaði at spæla í skúlanum. Tað var stuttligt og tað er tað enn, sigur Jan.

Báðir eru samdir um, at stuttleikin, og tað at vera við og vera í umhvørvinum, er stuttligt og er drívmegin.

Jan byrjaði við at leika guitar, men skifti síðani til bassin. Sigurd hevur ikki leikað trummur so leingi, men trummur hava verið í húsinum leingi, tí stóri beiggin átti tær. So var náttúrligt, at Sigurd royndi seg. Hann vónar at sleppa at læra nótar , men hann hevur ringar royndir av at standa í bíðirøð. Hann stóð í 3 ár til klaver við Musikkskúlan, men vónar, at bíðitíðin er styttri til trummur.




*Lýsingin, ið fekk forvitnu blaðfólkini at fregnast um søguna aftanfyri*

### Dreymar

Hvat droyma ungir tónleikarar í Føroyum í dag um?

Sigurd og Jan eru álvarsmenn og teimum nýtist ikki langa umhugsunnartíð og teir halda seg ikki aftur.

- Øll siga, at tey vilja gerast kend. Hetta hevur sjávsagt nakað at siga og er í huganum. Men mær dámar væl at spæla og tað er tað, ið hevur týdning. Blíva vit kendir, so er tað fínt, sigur Sigurd.

Ja, so er fínt, tekur Jan undir, men minnir á, at lívið undir hattinum hjá stórum feløgum ikki altíð er stuttligt, men kann vera bundið og kravmikið.

PopTop konsertin er ikki stór, men tó...

- Fyri okkum, ið leika, er hon stór. Prix Føroyar er største tiltakið í Føroyum innan tónleik og liggur sjálvsagt í huganum, sigur Sigurd, sum tó ikki ljóðar, sum hetta er nakað, ið hann enn hevur hugsað um av álvara.

- Prix Føroyar er eitt gott stað at koma sær fram. Ein góð lopfjøl, metir Jan.

### Fingu svar

Teir báðir hava fingið svar uppá lýsingina.

Ein bólkur, ið júst vantar ein bassleikara og ein trummuleikara, hevur sett seg í samband við teir og hetta eru teir spentir uppá.

Spurdir, um teir ikki eru bangnir fyri at missa seg sjálvar burtur, við at fara uppá ein bólk, siga teir, at tað eru teir ikki, men at teir tó hava havt hugsanina frammi.

- Vit vilja ikki broytast og ynskja ikki at broyta nakran. Men riggar tað ikki, so gerst ikki við. Men tað gongur nokk, tí vit kunnu spæla eitt sindur av hvørjum og tað kunnu hinir vónandi eisini, sigur Sigurd.

Enn hendir tó einki, tí ikki fyrr enn skúlin byrjar fatur, sleppa teir inn aftur í venjingarhølini í Djónastovu.

### Einki navn

Enn hava Sigurd og Jan einki navn funnið, ið teir kunnu nýta til ein bólk.

- Tað er sera trupult at finna. Vit royndu tað við Sideeffect. Vit høvdu brainstorm, men funnu einki nýtiligt, siga teir báðir.

Teir eru tó samdir um, at navnið skal rigga á enskum og føroyskum, um gjørligt. Sum dømi nevna teir Krit, ið er navn á øðrum bólki.

Eisini skal talan vera um okkuret við meining í, okkurt, ið hugsast skal um. Okkurt, ið setur hugsaninar í gongd.

- Onkur bólkur í USA hevur funnið onkra reglu í onkrari gamlari Inkabíbliu, ella líknadi, sigur Jan og dylir ikki, at hetta metir hann vera á rættari leið.

Uttan mun til, hvat navnið verður, so verður stuttligt at vita, hvat kemur burturúr hjá monnunum handan lýsingina eftir guitarleikara. Fara teir at leika á PopTop konsert, á Prix Føroyum ella gerast teir kendir úti í heimi?

Tá tíðarinnar tám lýsir í, fæst at vita, hvat framtíðin hevur at bjóða monnunum handan lýsingina.

Livst, so spyrst!

# Harkaliðið á fløgu



**Tutl hevur endurútgivið útgávu við Harkaliðnum, so henda nú er tøk á fløgu**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Tutl hevur givið út aftur útgávuna, ið kom við Harkaliðnum í 1971. Sostatt er henda plátan við Harkaliðnum nú tøk á fløgu.

Annika, Jógvan Telling Joensen, Jógvan Dahl og Kári Mouritsen komu í 1971 á marknaðin við hesi útgávuni.

Harkaliðið var virkið hesa tíðina, men er tó ikki gloymt. Og, fyri at vera við árstíðina, so spratt bólkurin meira og minni úr kabarettumhvørvinum og leikti fleiri kabarettvísur, ið gjørdust fólkaogn. Nei, gloymd eru tey ikki. Hetta prógvaðu t.d. konsertirnar, ið bólkurin hevði fyri eini 8-9 árum síðani, har tey aftur fóru á pall, eftir støðg í áravís.

Harkaliðið leikar á fløguni 11 løg. Nevnast kunnu Í búri, Eitt kvøldi so síðla, Í dans og Á mønu hjalsins. Øll løgini eru tó løg, ið flest øll kenna og er tí at fegnast um henda møguleika at hoyra gomlu upptøkurnar á fløgu.



# Syng, Kathy, syng

**Sangur fyllir nógv í tilveruni hjá Kathy Chiavola. Sjálvt teldupostadressan ber boð um hetta. Hon er kathy-sing-one.**

LISTASTEVNA
*Birgir Kruse*

Kathy Chiavola er klassiskt skúlað at syngja operu, men hevur valt sær bluegrass sum øki. Hetta slagi av tónleiki er grundað av Bill Monroe, sum á sinni yrkti »Blue moon of Kentucky«. Kathy Chiavola, sum hevur stóran áhuga fyri tónleikasøgu, var hin síðsta at syngja saman við Bill Monroe innan hann doyði. Søguligu upptøkurnar eru við á fløguni »The Harvest« frá 1995. Á somu fløgu medvirka eisini Chet Atkins, sáli, Emmylou Harris og Vince Gill. Nú verður høvi at hoyra Kathy syngja herheima.

Bluegrass er grein av amerikanskum country tónleiki, sum stavar úr Kentucky, róptur the Bluegrass State. Tað vóru Bill Monroe and the Bluegrass Boys, sum skaptu henda lívliga tónleik, sum verður leiktur á streingjaljóðføri sum banjo, fiól, gittar, dobro og mandolin. Mett verður, at bluegrass byggir á fólkatónleik úr Appalakkufjøllum, men hugsan og virki Monroe's kann í ávísan mun knýtast at bebop og tí samtíðar jazz tónleiki, har improvisatiónir eru vanligar.

Kathy Chiavola hevur í fleiri førum verið kosin ársins navn innan bluegrass. Tey fólk, ið virkin eru innan hesa tónleikagrein, leggja alstóran dent á at varveita tónleikin og at bera henda siðaarv víðari, bæði á palli og á fløgu. Rætt sum við kvæðunum herheima. Í hesum sambandi hevur Kathy Chiavola fingið hópin av virðislønum.

Kathy vaks upp í Kansas býi og fekk scholarship á Oberlin Conservatory of Music, har hon leyk prógv í voice, rødd og ræddarvenjingum. Síðani hevur hon lisið á lærda háskúlanum í Indiana og hevur sungið operu.





*Kathy avmyndað millum Carl Jackson og tann kenda Vince Gill, sum hon hevur verið ræddarvenjari hjá.*

Kathy Chiavola hevur í mong ár arbeitt sum ræddarvenjari, m.a. hjá Vince Gill og medvirkar á fløgum hjá Garth Brooks og Kathy Matthea. Hetta sæst í lítillætna heimi hennara í Nashville, har køkurin ar avtikin við platinplátum. Rødd Kathy's, ið ummælarar stutt og greitt kalla »the voice«, er eisini at hoyra í so ymsum samanhangum, sum til guðstænastu í BBC og í lýsingum hjá MacDonalds.

Fyrsta fløga Kathy's í egnum navni róptist »Labor of Love« og kom í 1993. Onnur fløgan »The Harvest« kom í 1995 og í vár kom nýggjasta fløgan »From where I stand«. Henda fløgan fekk serstakliga gott ummæli og varð kosin spotlight album í bretska blaðnum Country Music People.

Kathy smæðist ikki fyri at vera rættuliga persónlig. Á nýggjastu útgávuni minnist hon mannin Randy Howard, sum doyði í fjør og á fyrstu fløguni, sum hon ognar mammuni, hoyra vit eina gamla upptøku úr barnaheiminum. Kathy er eisini við á einu hugtakandi savnsfløgu við sangum hjá Hank Williams, ein av hornasteinunum undir modernaðum tónleiki, tað verið seg country ella rock and roll. Útgávan, sum kom í 1995, rópast »A Picture of Hank - the new bluegrass way«.

Við sær á Føroyaferðini hevur Kathy Chiavola egna trio. Talan er um Brent Truitt, sum spælir mandolin, Markie Saunders á akustiskan bass og Richard Bailey, sum spælir banjo. Fyrra kvøldið spæla tey fýra í nýggja Mentunarhúsinum í Fuglafirði og kvøldið eftir í konserthøllini í Norðurlandahúsinum. Í báðum førum fara Dupultkvartettin í Ebenezer og Ragnar í Vík at verða gestir á pallinum hjá Kathy og teimum.

Tað er bretska plátufelagið Demon Records, sum umboðar Kathy Chiavola í Evropa.

